FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

**Leiðslufundur 7. juni 2016**

| | |
|---|---|
| Heiti: | Leiðslufundur |
| Til staðar á fundinum vóru: | Sigurð í Jákupsstovu (SíJ), Turið Sigurðardóttir (TS), Hans Andrias Sølvará (HAS), Hans Pauli Joensen (HPS) og Jørgen Meitilberg (JM) |
| Skrivað hevur: | JM |
| Fundartíð: | týsdagur, 7. juni 2016 |
| Fundarstaður: | Setursskrivstovan |

**Mál til støðutakan:**

**Mál til umrøðu:**

1. **Niðurstøða hjá Lestrarráðið – búskaparfrøði**

Ein loysn má finnast á málinum. Næsta stig er at skipa fyri fundi við Jóannes Jacobsen, soleiðis at ein loysn verður funnin skjótast gjørligt.

Støddirnar á skeiðum á Setrinum eru rættiliga ymiskar, hetta førir við sær, at samstarv tvørtur um deildir og útbúgvingar kann vera torført. Arbeiðið við at gera skeiðstøddirnar meira eins og at skipa felags lestrarár verður sett í verk í næstum.

Greiðari mannagongdir mugu orðast viðvíkjandi góðkenning av útbúgvingarprofilum. Tað er umráðandi at øll innanhýsis viðurskifti eru avklárað, áðrenn nýggjar útbúgvingar verða sendar MMR til góðkenningar.

2. **Tekstur til Ríkisumboðið**

Dekanarnir kanna um teksturin fyri deildirnar er rættur. JM orðar tekstin lidnan og samskiftir við Ríkisumboðið.

3. **Arbeiðsbólkar at gera ársnorm fyri undirvísing**

Arbeiðsbólkarnir verða mannaðir soleiðis:

- Námsvísindadeildin:  Annika Antoniussen
- Føroyamálsdeildin:  Malan Marnersdóttir
- Náttúruvísindadeildina: Hóraldur Joensen
- Sjúkraøktarfrøðideildin: Annemi Joensen
- Søgu og Samfelagsdeildin: Gestur Hovgaard
- Umboð fyri fyrisiting: Rannvá Dávadóttir

- Leiðsla: Sigurð í Jákupsstovu (formaður)
- Leiðsla: Janus Jensen

**Kunningarmál:**

**Ymiskt:**